# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 29.02.2016*

**Bygdaráðsfundur: 29.02.2016 kl. 16.30 til kl. 18.45**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 14/2016 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0011-0051
**Málslýsing**
Roknskapurin hjá Bókasavninum fyri 2015 er blivin grannsk. av SPEKT og
er sendur kommununi til góðkenningar.

**Tilmæli**
Á fundi 24.02.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum fyri 2015 hjá Bókasavninum í Nes kommunu soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 15/2016 Umhvørvisvernd**
J. nr. 09.01.07-K09-1-16
**Málslýsing**
Á fundi í Teknisku nevnd 17.11.2015 var umsjónarmaðurin í skúlanum, og segði frá framtíðarkrøvum til svimjihylin, og at tað m.a. var neyðugt at skifta tey bæði sandfiltruni sum eru.

Í hesum sambandi hevur umsjónarmaðurin sett seg í samband við frá Teknologisk Institut fyri at fáa kanna, uppmála, skráseta og rokna út. Hetta kostar uml. kr. 15.000,00 fyri konsulentin.

**Tilmælir**
Á fundi 17.02.2016 mælir Mentanarnevndin til at fáa ein konsulent frá Teknologisk Institut at kanna, uppmála, skráseta og rokna út og koma við einum uppskoti um loysn, kostnaður er kr. 15.000,00

Á fundi 24.02.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum svimjihøllin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 16/2016 Fyrisitingarligar skipanir**
J. nr. 85.11.00-G12-1-16
**Málslýsing**
Neyðugt er at fáa nýggja Kt-útgerð til Tofta skúla, talan er um nýggja servaraloysn og nýtt tráðleyst net. Servarin er frá 2008, lítið pláss er eftir á honum, er ótíðarhóskandi og kann ikki dagførast. Tráðleysa netið er eisini frá 2008 og ótíðarhóskandi.

Samskifti hevur verið við tveir veitarar, sum eisini hava latið tilboð inn. Leiðsla skúlans er komin til tað niðurstøðu, at tilboðini eru sambærlig og mælir til, at tikið verður av lægra tilboðnum, sum er frá Formula, áljóðandi kr. 169.668,00 u/mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 29.02.2016 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá Tofta skúla.

Á fundi 29.02.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at kt-útbúnaðurin verður leasaður yvir 5 ár við einum mánaðarligum gjaldið áljóðandi kr. 3.533,00 við 6,25 % mvg, og at peningurin verður tikin av stovninum skúlin – kt-útbúnaður.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 17/2016 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.04.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Arbeitt hevur verið við at fingið lendið, til gøtuna frá undir Nesinum og oman í Saltnes. Kommunan hevur nú fingið øll loyvir til nýtslu av lendinum.

**Tilmælir**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til at fyrireika arbeiðið.

Á fundi 24.02.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og mælir til, at arbeiðið verður gjørt innan teir fíggjarkarmar, sum eru undir stovninum vegir – gøtur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 18/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 15.01.2016 søkja Turid og Petur Hans Hansen um loyvi til at leggja tak á fundamentið omanfyri húsini hjá teimum.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjarunum byggiloyvi eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 19/2016 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.01.00-P20-3-16
**Málslýsing**
Í skrivi 25.01.2016 hevur Nes kommuna fingið áheitan um at fáa sett gøtuljós upp og breiðka gongu-/súkklubreyt eftir landsvegnum, frá har sum Rókavegur byrjar og líka inntil har sum gongubreyt endar vestanfyri Runavíkar skúla, eftir hesum strekki ganga/súkkla og renna nógv fólk, og oftani eru rennikappingar eisini eftir hesum strekki.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til, at skrivlig áheitan verður send til Landsverk, sum varðar av landsvegnum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 20/2016 Vegir og ferðsla**
J. nr. 05.09.00-P20-3-16
**Málslýsing**
Í skrivi 10.02.2016 heita íbúgvar við Hjallaveg á Nes kommunu um at fáa betri parkeringsviðurksifti á vegnum, og at møguleiki er at gera parkeringsøki norðanfyri Hjallaveg 3.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur á fíggjarætlanini 2016 til kommunal parkeringsøki.

At kommuna kannar umstøðurnar viðvíkjandi kommunalum parkeringsøkjum, og møguliga gera eina ætlan yvir almenn parkeringsøkir í kommununi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 21/2016 Havnir**
J. nr. 08.03.00-Ø54-1-16
**Málslýsing**
P/F Eysturoy hevur í løtuni ikki brúk fyri at leiga so stórt øki norðanfyri bygningin, soleiðis sum teir gera í løtuni, og søkir Nes kommunu um at fáa minkað um leigaða økið norðanfyri.

**Tilmælir**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til, at P/F Eysturoy fær loyvi til at minka leigaða økið norðanfyri bygningin.

Á fundi 18.02.2016 tekur Vinnunevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Á fundi 24.02.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og Vinnunevndini og mælir til, at broytingin kemur í gildi 1. apríl 2016.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd, Vinnunevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 22/2016 Vegir og Ferðsla**
J. nr. 05.01.00-P20-2-16
**Málslýsing**
Hin 24.01.2016 verður heitt á Nes Kommunu um at fáa Landsverk at flyta omankoyringina til bryggjuna í Saltnesi uml. 30 metur norðureftir, og samstundis gera eitt stórt pláss til bussarnar norðanfyri omankoyringina og eisini eitt busskýli, og at gjørd verður gongubreyt tvørtur um vegin, Hetta fer at gera tað nógv tryggari hjá okkara borgarum, sum ferðast hvønn dag við bussinum.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til at skrivlig áheitan verður send til Landsverk.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 23/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J. nr.02.32.02-P20-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 01.02.2016 søkir Benn Johannesen um byggiloyvi til sethús og bilhús á matr. nr. 474o, á Lýðarsvegnum. Sethúsini eru 90m² til støddar og bilhúsið er 32 m² til støddar.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjarunum byggiloyvi til sethús og bilhús á matr. nr. 474o eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 24/2016 Vegir og ferðsla**
J. nr. 05.09.00-P20-2-16
**Málslýsing**
Í skrivi 05.02.2016 heita borgarar við Rókaveg um at gera parkeringspláss á vegnum norðanfyri húsini á Rókaveg 1.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur á fíggjarætlanini 2016, til kommunal parkeringsøki.

At kommunan kannar umstøðurnar viðvíkjandi kommunalum parkeringsøkjum, og møguliga gera eina ætlan yvir almenn parkeringsøkir í kommununi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 25/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J. nr. 02.34.02-P20-3-16
**Málslýsing**
Í skrivi 04.02.2016 søkir Sp/f Marká vegna Alomu Davidsen um byggiloyvi til havastovu á matr. 125b Toftir. Byggingin verður niður á ein part av bilhústakinum 4000x4000 mm.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjarunum byggiloyvi til havastovu eftir ávísum treytum.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 26/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J. nr. 02.34.02-P20-2-15
**Málslýsing**
Í skrivi 08.02.2016 søkir P/F Norðsetur vegna Helen Højgaard og Jan Joensen um byggiloyvi til sethús á matr. 357f Toftir. Sethúsini eru í tveimum hæddum stovuhædd og loft.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02..2016 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjarunum byggiloyvi til sethús á matr. nr. 357f eftir ávísum treytum:

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 27/2016 Útstykking og lendisskipan**
J. nr. 01.04.00-G01-2-15
**Málslýsing**
Í skrivi 4.07.2015 sendir Búnaðarstovan umsókn um uppískoytisstykki til, húsini á Gráasteini, matr.nr. 394 Tofta bygd, til ummælis hjá kommununi.

Uppískoytisstykkið sum biðið verður um er bæði omanfyri og niðanfyri landsvegin (Saltnesvegur):

Umsóknin hevur verið til ummælis hjá Landsverki, sum í skrivi 8. februar 2016 boðar frá, at Landsverk onki hevur ímóti, at uppískoytisstykkið, søkt verður um, verður lagt aftur at Gráasteins ognini.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.1016 mælir Tekniska nevnd til at loyvið verður givið til uppískoytisstykkið omanfyri vegin.

At loyvið til uppískoytisstykkið niðanfyri vegin, verður tikið upp aftur tá ein ítøkulig ætlan, fyri økið niðan fyri vegin, fyriliggur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Jákup A. Olsen var úti, meðan málið var viðgjørt

**Mál nr. 28/2015 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.09.00-P20-4-16
**Málslýsing**
Í skrivi innkomið 16.02.2016 heita borgarar við Lágabøi á Nes kommunu um at gera parkeringspláss í Lágabøi, norðanfyri Lágabø 16.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur á fíggjarætlanini 2016 til kommunal parkeringsøki.

At kommuna kannar umstøðurnar viðvíkjandi kommunalum parkeringsøkjum, og møguliga gera eina ætlan yvir almenn parkeringsøkir í kommununi.
**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 31/2015 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.26-P20-1-16
**Málslýsing**
P/F Eystur- og Sandoyartunnlar hevur boðað kommununum við Skálafjørðin frá, at tær kunnu fáa part av grótinum, sum kemur úr Eysturoyartunlinum at býta í millum sín. Nes kommuna hevur gjørt vart við, at hon er áhuga í at fáa grót frá Eysturoyartunlinum. Kommunurnar hava práta saman, men enn er ikki nøkur avtala gjørd um býtið.

Í sambandi við, at Nes kommuna skal taka í móti gróti frá Eysturoyartunlinum, skal góðkenning fáast frá Umhvørvisstovuni til tær verkætlanir, har grótið skal brúkast. Umhvørvisstovan hevur

boðað frá, at verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka náttúru og umhvørvi munandi, kunnu ikki setast í verk uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni. Slík góðkenning skal vera grundað á eina meting av avleiðingunum fyri náttúru og umhvørvi.
Kommunan skal í góðari tíð seta seg í samband við Umhvørvisstovuna fyri at greiða frá verkætlanum, í minsta lagi 6 mðr. áðrenn at ætlanin skal byrja. Tunnilsfelagið hevur boðað Nes kommunu frá, at felagið ikki kann byrja uppá tunnilsarbeiði fyrr enn teir vita, hvar grótið skal brúkast og øll neyðug loyvi fyriliggja hesum viðvíkjandi.

Tekniska nevnd hevur viðgjørt spurningin um hvar grótið, frá Eysturoyar tunnlinum, skal nýtast. Nevndin vísir á, at Nes kommuna kundi gjørt nýtslu av grótinum frá tunnlinum við hesi raðfesting:

- at fylla upp og gera bryggjukant við ferjuleguna
- gera bryggjukant frá verandi bryggju, undir høllini hjá Sp/f Steinhólm og inn til Ísvirkið
- fylla út í krókinum norðan fyri Faroe Origin og styrkja grótverjugarðin við bátahylin
- at leingja verandi grótkast/verjugarð norðureftir
- Harumframt metir nevndin, um nokk av gróti verður til taks, at kommunan eigur at leingja ídnaðarøki inni við Rætt norðureftir.

Ein meiri nágreinilig kanning av ymisku verkætlanum eigur at verða gjørd, sum m.a. eisini inniheldur eina kostnaðarmeting, men fyrst eigur kommunan at gera neyðugu umhvørviskanningarnar og fáa neyðugu loyvini frá Umhvørvisstovuni til vega.

**Tilmæli**
Á fundi 18.02.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan beinanvegin fær gjørdar neyðugu umhvørviskanningarnar av teimum verkætlanum, sum nevndin vísir á, og fær neyðugu loyvir til vega frá Umhvørvisstovuna.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 32/2016 Vegir og ferðsla</u>**
<u>J.nr.05.01.02-P20-1-16</u>
**Málslýsing**
Í samband við gerð av Eysturoyartunnilinum, verður Rókavegurin avkvettur eitt skifti í samband við gerð av tunnilsportalinum í Saltnesi. Sambært leiðsluni í P/F Eystur- og Sandoyartunnlar, so er møguligt at leggja Rókavegin aftur í somu legu, sum hann liggur í dag.

Í teknisku nevnd er Rókavegurin viðgjørdur í sambandi við ætlaðu tunnilsgerðina, og spurningurin er reistur, um møguleiki átti at verið kannaður, at lagt Rókavegin á annan hátt og møguliga bundið hann saman við íbindingarvegnum til Høganesætlanina. Hetta krevur, at kommunan leitar sær ráðgeving fyri at kannað hvørjir møguleikarnir eru.

Nes kommuna hevur í nógv ár havt ætlanir um at innkoyringin til nýtt íbúðarøki á Høganesi verður vestan fyri skúlan við Løkin í Runavík. Byrjanin av innkomuvegnum kemur at liggja í øki hjá

Runavíkar kommunu. Runavíkar kommuna hevur tann 4. apríl 2013 samtykt at geva Nes kommunu loyvi at gera nýggja vegíbinding í landsvegin, vestan fyri Skúlan við Løkin. Landsverk hevur í skrivi 14. apríl 2011 givið prinsipelt loyvi til hesa íbinding, við ávísum treytum.
Tekniska nevnd ásannar, at tá Eysturoyartunnilin verður tikin í nýtslu, fer ferðslan eftir landsvegnum til tunnilin at vaksa, og tað er tí av stórum týdningi, at ferðslan á hesum øki verður so væl skipað sum møguligt, og at ferðslutrygdin er ílagi.

**Tilmæli**
Á fundi 22.02.2016 mælir Tekniska nevnd til, at Nes kommuna fær sær sakkøna hjálp til at kanna hvørjir íbindingarmøguleikar eru í samband við verandi landsveg og nýggjan íbindingarveg til Høgnanes, og at søkja Landsverk um endaligt loyvi til íbinding frá landsvegnum niðan á Høganes.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 33/2016 Rakstrargøgn, innbúgv, keyp og viðlíkahald**
j.nr. 83.11.01-G01-1-15
**Málslýsing**
Flyting av fígging, fyri keyp av bili, frá 2015 til 2016

Á bygdaráðsfundi 26.10.2015 var samtykt at keypa nýggjan bil til teknisku deild, og tikið var av tilboðnum frá KJ Hydraulik.Samtykt var eisini, at bilurin skuldi og fíggjast við lántøku.

Av tí at bilurin ikki er komin í 2015 er neyðugt at flyta fíggingina av keypinum fyri bilin til 2016.

**Tilmæli**
Á fundi 24.02.2016 mælir Fíggjarnevndin til at fíggingin, fyri keyp av nýggjum bili, verður flutt til 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.